# »Vanlukka« í skúlagarðinum

**Sundalagsstevna:** Skúlin í bygdini verður karmur um ein part av tiltøkunum á Sundalagsstevnuni um vikuskiftið. Eitt av hesum tiltøkum, sum serliga vendir sær til børnini, er eitt, ið ber heitið »112 Barnatiltak«. Hetta tiltakið byrjar í kvøld kl. 19:30, og her fara løgreglan, sløkkiliðið og sjúkrabilurin at hava framsýning við skúlagarðin.



# Gongutúrur til fjals

**Sundalagsstevna:** Vanligt er, at ein slík bygdastevna gongur fyri seg niðri í sjálvari vertsbygdini. Her á Sundalagsstevnuni verður kortini øðrvísi: Eitt av tiltøkunum gongur nevniliga fyri seg í fleiri hundrað metrar hædd. Kl. 13:30 sunnudagin verður boðið til ein gongutúr niðan á Sneisina, har ein staðkendur ferðaleiðari verður við. Neyðugt er ikki at tekna seg frammanundan.

# Treingir til eina hond

**Hvalvík:** »Tíðarinnar tonn« fer við øllum. Eisini við úthanginum á bygninginum, sum í síni tíð var posthús í Hvalvík.

Fyrrapartin í gjár var fyrrverandi postmaðurin, Petur Zachariasen í ferð við at skifta úthangið á hesum bygninginum.

- Ja, nú trongdi tað sanniliga til. Eg má heldur fáa tað liðugt, áðrenn stevnan byrjar, sigur hann við einum brosi.

Sum hjálparmann hevði hann bróður sín, Hanus Zachariasen, sum er heima í summarfrí í hesum døgum.

Hann býr annars í Vejle, og hevur millum annað ført stásiliga ferðamannaskipið Queen of Scandinavia.

**sb.**



*Peturi dámar væl at sveiggja hamarin. Bróðurin Hanus stuðlar honum í arbeiðinum*
*Mynd: Snorri Brend*

# Vakur sandur

**Í góðveðrinum í gjár var 1. flokkur í Gøtu skúla farin útferð til Hvalvíkar.**
**- Sandurin her er ótrúliga vakur, søgdu næmingarnir við ein munn.**

**Hvalvík:** Tey vóru farin úr Gøtu árla á morgni við bussi. Fyrsti steðgur teirra var í barnaheiminum hjá tí eina læraranum, Hallbjørg, ið er ættað úr bygdini.

Har hevði mamma hennara borðreitt við einum góðum drekkamunni, áðrenn farið varð oman á sandin at hugna sær.

Hóast tey hugnaðu sær, so var hetta eisini ein annar máti at undirvísa í: Tey funnu ein hóp av skeljum og øðrum, ið natúrliga hoyrir til eina slíka fjøru.

- Tað er stórur munur á sandinum her og honum í Gøtu: Okkara er brimpláss, men her funnu vit ymiskt, sum vit ikki síggja hjá okkum, siga tey.

Alt tað tey funnu, verður tikið við í skúlan har tað skal nýtast í innlæringini í millum annað føroyskum, nú tey fara at seta navn á hvønn einstakan lut.

Eftir at hava hugnað sær á sandinum eina tíð, vitjaðu tey í kirkjuni og í kirkjugarðinum, áðrenn tey fóru fram í Dal, tey nevna.

Her skuldu tey steðga eina løtu, áðrenn matpakkin skuldi etast heima hjá Hallbjørg, ið eigur hús innarlaga í Hvalvík.

Seinnapartin kom bussurin aftur eftir teimum, og síðani varð leiðin løgd aftur til heimbygdina.

**sb.**



*Í 1. flokki í Gøtu skúla eru 13 næmingar – 8 gentur og 5 dreingir. Dreingirnir eru: Fríði, Jónas, Arnbjørn, Sámuel, Hans, Tonni, Viktor og Magnus. Genturnar eru: Kristianna, Bjørg, Inga Maria, Hanna og Anna. Lærararnir eru: Julia og Hallbjørg.*
*Mynd: Snorri Brend*

# Tíðin fer til

*» Ein má ongantíð taka nakran dyst ov lætt*

**Jógvan Zachariasen gongur í 7. flokki í Hvalvíkar skúla.**
**- Frítíðina brúki eg mest til fótbólt. Eg spæli sjálvur og havi sæð næstan allar dystirnar hjá EB/Streymi í ár, sigur hann.**

FÓTBÓLTUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Streymnes:** - Nei, vit vilja sleppa at sparka eitt sindur longur. Vit tíma ikki inn í skúlan beint nú!

Lærararnir við Hvalvíkar skúla hava júst biðið børnini um at gevast við fótbóltsspælinum. Men hetta gongur ikki sum ætlað.

Tey hava beint frammanundan býtt seg í tvey lið, og nú gongur dysturin uppá tað allar besta á fótbóltsvøllinum í Streymnesi. Og nú skulu tey so inn í eina heita skúlastovu!

Tey fáa kortini loyvi at spæla eina lítla løtu aftrat, men so er altso nóg mikið: Nú má onnur lærugrein á tímatalvuna innanveggja.

Millum hesar næmingarnar og íðnu fótbóltsspælararnar er Jógvan Zachariasen.

– Hetta er ein sera góður vøllur, ið vit hava fingið, sigur hann.

Sjálvur spælir hann við smádreingjunum hjá EB/Streymi. Komandi ár verður hann at síggja á dreingjaliðnum, - eitt lið, sum mong vænta sær nógv av í framtíðini.



*Gott er at sleppa út úr skúlastovuni og niðan á vøllin at røra seg – Jógvan Zachariasen avmyndaður saman við hinum næmingunum úr 3. til 7. flokk við Hvalvíkar skúla*
*Mynd: Snorri Brend*

## Í miðjuni

Jógvan hevur altíð havt áhuga fyri fótbólti – og sambært fólki í økinum er hann haraftrat ein góður spælari.

– Eg havi spælt fótbólt í eini átta ár. Tað dámar mær sera væl, sigur hann við Sosialin.

Í landskappingini í fótbólti kom smádreingjaliðið hjá EB/Streymi at liggja rættiliga miðskeiðis í teirra bólki.

Sjálvur heldur Jógvan, at tað kundi gingið eitt sindur betri. Men plaseringin á stigatalvuni hevur eisini sína orsøk.

– Tað gekk ikki so gott hjá okkum at byrja við. Men ímóti endanum komu vit rættiliga fyri okkum, greiðir hann frá.

Hinvegin gekk tað munandi betri hjá teimum í steypakappingini. Men kortini ikki nóg gott!